

www.oljan.fo

**Jan Müller** 12 - 06 - 2012

# Cosl Pioneer sett kós móti Føroyum

Tíðliga týsmorgun legði kinverski boripallurin Cosl Pioneer frá landi í Norra við kós móti Føroyum. Pallurin verður á leitistaðnum Brugdan 2 leygardagin veit oljan.fo frá keldum. Vanliga tekur tað einar tveir til tríggjar dagar at gera klárt at seta borin í. Eftir øllum at døma verður farið at bora tíðliga í komandi viku. Boritíðin er mett at taka 4 til 5 mánaðir. Tað er Statoil, sum er fyristøðufelag fyri boringini, og í hesum sambandi eru nógv fólk komin til Føroya at vera partur av hesi størstu boriverkætlanina í føroyskari søgu. Talan er um serfrøðingar hjá Statoil í útlandinum og umboð fyri ymsar veitarar, eitt nú borifelagið Cosl. Tveir føroyingar eru við boripallinum.

